## Hartar Norðurlond



Íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, heldur, at hini Norðurlondini hava svikið Ísland og hava roynt at trýsta landið til at góðtaka eina vánaliga gjaldsavtalu við Bretland og Niðurlond um Icesave-skuldina. Tað segði forsetin við norska blaðið Aftenposten um vikuskiftið. Forsetin vísir á, at Norðurlond hava sýtt fyri at rinda Íslandi eitt játtað lán, fyrr enn íslendingar hava skrivað undir eina nýggja avtalu um Icesave-skuldina. Norski uttanríkisráðharrin, Jonas Gahr Støre, sigur við Aftenposten, at tað er ikki rætt, sum íslendski forsetin sigur.

## Óhepnar íløgur

Eitt yvirlit yvir íløgurnar hjá tí almenna norska oljugrunninum hevur elvt til kjak í Noregi. Yvirlitið vísir millum annað, at grunnurin hevur gjørt íløgur í virksemið, sum er við til at tryggja tilveruna hjá hernaðarstýrinum í Burma, eins og pengar hjá grunninum eru medvirkandi til, at Marokko framhaldandi kann herseta Vestur-Sahara. Tað hevur eisini vakt ans, at oljugrunnurin setir pengar í virksemið, sum fer illa við umhvørvinum. Atfinningarnar hava fingið einstakar politikarar at krevja betri eftirlit við oljugrunninum, og hvussu grunnurin brúkar sínar pengar til íløgur.

# Eg kann rúka næstu ferð

**– Stemingurin eftir kappingina fríggjakvøldið var sum til eina jarðarferð, sigur Anna Nygaard. Hon stúrir fyri at enda í vanda fríggjakvøldið**

X FACTOR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tárini trillaðu. Eingin dugdi at verða glaður fyri at koma víðari í kappingini. Og sjálvt dómararnir klemmaðu hvønn annan.

X Factor kappingin í Danmark, har føroyska Anna Nygaard er við, er blivin ein gróthørð kapping, har kenslurnar fara við teimum flestu. Hvørja viku verður ein luttakari sendur úr kappingini, men tað er ikki uttan grát og tannagrísl.

– Vit arbeiða so tætt saman øll og hava eitt so gott forhold, at tað er ræðuligt, tá ið onkur skal koyrast úr kappingini, sigur Anna Nygaard.

– Fyri meg persónliga var fríggjakvøldið tann størsta marran. Tine er blivin mín nýggja lítlasystur, og Daniel er mín besti vinur í kappingini. Tá tey sungu umaftur fríggjakvøldið, útbrølaði eg.

### Jarðarferð

X Factor er gott sjónvarpsundirhald, men fyri tey, sum standa mitt í støðuni, er tað ikki so so undirhaldandi.

– Stemingurin eftir kappingina fríggjakvøldið var sum til eina jarðarferð. Tað er syrgiligt, at sangarar skulu koyrast úr kappingini, og bæði luttakarar og dómarar grótu og klemmaðu hvønn annan, sigur Anna Nygaard.

– Vit eru so fá eftir í kappingini, at nú kunnu vit øll enda í vandabólkinum. Tað kann líka so væl verða eg, sum rúki næstu ferð, men eg havi gott mót til næsta umfar.

### Vil í finaluna

Fimm luttakarar eru eftir í X Factor kappingini, og trý av teimum sleppa í stóru finaluna, sum verður í Parkini síðst í mars.

– Mítt stóra mál er at koma í finaluna, men eg veit, at kappingin er sera hørð um finaluplássini, sigur Anna.

±Og hon viðurkennir, at hon kennir seg ikki trygga um, at hon kann røkka finaluni.

– Eg eri nervøs. Eg vil so gjarna í finaluna, og tað virkar eisini, sum at fólk vænta av mær, at eg skal koma so langt. Men allir sangararnir eru so góðir, so einki er vist, sigur Anna Nygaard.



*– Eg eri nervøs. Eg vil so gjarna í finaluna, og tað virkar eisini, sum at fólk vænta av mær, at eg skal koma so langt. Men allir sangararnir eru so góðir, so einki er vist, sigur Anna Nygaard*
*Mynd: DR*

**FAKTA**

Fimm sangarar eru nú eftir í donsku X Factor kappingini. Teir eru:

Anna
Jesper
Tine
Thomas
The Fireflies

Næstu tvær vikurnar skulu tveir luttakarar afturat sendast úr kappingini.

Finalan við trimum finalistum verður í Parkini í Keypmannahavn leygarkvøldið 27. mars.

*Karl Martin Samuelsen:*



**Hon kemur í finaluna**

*Kemur Anna í X Factor finaluna?*
Ja, hon kemur í finaluna, og hon fer at kappast við Thomas um at vinna.
*Hvussu hevur hon klárað seg higartil?*
Hon hevur klárað seg sera væl og hevur góða rødd. Við tí góða sangteknikkinum hevur hon víst - eins og Linda gjørdi - at føroyingar eru ikki bara hvørjir sum helst, tá tað kemur til sang og aðra list.

*Malan Eyðunsdóttir:*



**Anna er besti sangarin**

*Kemur Anna í X Factor finaluna?*
Hon hevur ein góðan møguleika at koma í finaluna, men kappingin er hørð.
*Hvussu hevur hon klárað seg higartil?*
Hon hevur klárað seg ótrúliga væl. Hon er tann besti sangarin reint sangtekniskt, men kanska hevur trupulleikin verið, at tey ikki ordiliga hava funnið út av, hvør stílurin hjá henni skal verða.

*Finnur Jensen:*



**Eg havi broytt hugsan**

*Kemur Anna í X Factor finaluna?*
Ja. Hon er millum trý tey bestu. Kanska ikki tann besta, men føroysku atkvøðurnar skulu ikki undirmetast.
*Hvussu hevur hon klárað seg higartil?*
Má viðganga, at eg í byrjanini ivaðist í, um hon megnaði at variera sín sangstíl til annað enn Aretha Franklin-sjangruna. Men seinastu ferðirnar hevur hon fingið meg á aðrar tankar.